# Hanus í Leirvík

Fríggjakvøldið 24. apríl verður skipað fyri hugnakvøldi í Bygdarhúsinum í Leirvík. Á skránni er ábit og undirhald, har millum annað Hanus Johansen luttekur. Hetta er aðru ferð at kórið Eystanljóð skipar fyri líkandi tiltaki, seinast var fyri tveimum árum síðani, tá fekk tiltakið sera góða undirtøku. Hesa ferð eru vit so heppin at hava fingið Hanus Johansen at luttaka. Á skránni er kalt borð, við alskins góðum mati, undirhald har Hanus Johansen syngur, upplestur við Óla Olsen, kórsangur og felagssangur.



# Finna lutir til marknaðardag

Sjónleikarhúsið í Havn skipar fyri árliga marknaðardegnum tann 2. mai. Nevndin í Sjónleikarhúsinum hevur gjørt fleiri ábøtur á Húsið fyri peningin, sum gjøgnum árini er komin inn á marknaðardegnum og aftur í ár fer peningurin óskerdur til røkt av Sjónleikarhúsinum, so tað framhaldandi kann vera karmur um gaman og álvara í komandi tíðum. Í tíðindaskrivi verður sagt, at tikið verður ímóti lutum til marknaðardagin gerandisdagar millum klokkan 8 og 20.

# Býráðslimir á Tvøroyri fingið 51.000 krónur í bót

**Og fyri hvønn dag sum gongur verða 1.500 krónur lagdar afturat til býráðið á Tvøroyri hevur aktað harraboð úr fíggjarmálaráðnum, men tað vil býráðið ikki**

ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Pauli Einarsson, varaborgarstjóri, vinstrumegin, og Kristin Michelsen, borgarstjóri er tveir av teimum treiskastu býráðslimunum á Tvøroyri og tað hevur higartil kostað teimum 9.300 krónur í bót í part. Og fyri hvønn dag, sum gongur, verða teir og tríggir aðrir býráðslimir á Tvøroyri, 300 krónur fátækari*

Tað er við at blíva ein dýr søga at verða býráðslimur á Tvøroyri.

Hvønn einasta dag noyðast fimm av teimum sjey býráðslimunum á Tvøroyri at betala 300 krónur í bót og tað skulu teir gera, til teir hava aktað harraboð úr Fíggjarmálaráðnum.

Men tað vilja teir ikki og sostatt gongur teljarin hvønn einasta dag.

### Ósemja um Smyril

Orsøkin er, at síðani í heyst hava Tvøroyrar Býráð og Fíggjarmálaráðið verið ósamd um roknskapin fyri Tvøroyrar Havn.

Fíggjarmálaráðið hevur kravt at Tvøroyrar Kommuna ikki inntøkuførir havnargjald fyri Smyril í roknskapin, tí tað er ósemja um havnargjaldið. Av tí sama er inntøkan so óviss, at fyri at geva eina rættvísa mynd av virkseminum hjá havnini, skal havnargjaldið ikki inntøkuførast.

Fyrrenn tað er gjørt, vil fíggjarmálaráðið ikki góðkenna roknskapin.

Men Tvøroyrar Býráð vil ikki akta, tí tað tvíheldur um, at tað hevur rætt til havnargjald og tey stúra fyri, at strika tey inntøkuna úr roknskapinum, fer býráðið at standa veikari í einum møguligum rættarmáli.

### Fáa dagbøtur

Tað endaði við, at fíggjarmálaráðið í jólamánaðinum í fjør tók tað heilt óvanliga stig at áleggja býráðslimunum á Tvøroyri dagbøtur, til roknskapurin varð rættaður.

Einasti býráðslimur, sum vildi ganga fíggjarmálaráðnum á møti, var Jaspur Vang og hann sigur, at sostatt fær hann ikki bót.

Dagbøturnar eru annars 300 krónur um dagin í part og teljarin fór ígongd 17. desember og taldi árið út.

Sostatt kostaði tað undanfarnu býráðslimum á Tvøroyri 4.500 krónur í bót í part og sostatt kostaði tað teinum seks býráðslimunum, sum komu undir bótina, 27.000 krónur tilsamans.

Á nýggjárinum tók nýtt býráð við og tá kom steðgur í bøturnar til nývalda býráðið fekk høvi at taka støðu til málið.

Men nýggja býráðið hevur somu støðu sum tað gamla og tískil varð teljarin settur ígongd aftur tann 6. apríl og hann telur enn.

Higartil eru sostatt farnir 16 dagar, har býráðslimirnir hava goldið 300 krónur í bót.

Men Jens Johannesen var ikki á býráðsfundi tá ið hetta varð umrøtt og tí fær hann ikki bót fyribils í ár. Men um hann so fær bót sum frá líður, veldst um, hvørja støðu hann hevur til málið.

Sostatt eru tað fimm býráðslimir, sum framvegis fáa dagbøtur fyri at seta seg upp ímóti harraboðum frá fíggjarmálaráðnum.

Og higartil í ár hava teir fimm býráðslimirnir á Tvøroyri sostatt fingið 4.800 krónur í bót í part í ár ella 24.000 krónur í bót tilsamans.

### 9. 300 krónur

Teir býráðslimir, sum hava sitið í báðum býráðnum og sum hava hildið fast við sína støðu, hava sostatt fingið heilar 9.300 krónur í bót í part.

Teir eru Kristin Michelsen, borgarstjóri, Pauli Einarsson, varaborgarstjóri og Bergur Bærendsen.

Marjun Olsen og Sverri Midjord sótu bara í undanfarna býráðið og tey hava sostatt fingið 4.500 krónur í bót í part.

Malla Dam og Hallur í Heygunum eru nývald í býráðið, so tey fáa bara bót frá 6. apríl í ár.

Men teljarin leggur 300 krónur afturat bótini fyri hvønn dag, sum gongur.

## Jaspur vil ganga undir krøvini

**Einasti býráðslimur á Tvøroyri, sum er sinnaður at akta boðini úr fíggjarmálaráðnum, er Jaspur Vang, men hann staðfestir, at tað hevur onki við bótina at gera**

ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Einasti býráðslimur á Tvøroyri, sum alment hevur givið til kennar, at hann er sinnaður at ganga krøvunum frá fíggjarmálaráðnum á møti og at broyta roknskapin fyri Tvøroyrar Havn, er Jaspur Vang.

Men hann legði dent á, at hetta hevði onki við bótina at gera sum so.

Hann førdi fram, at tá ið fíggjarmálaráðið krevur at inntøkan fyri havnargjaldið verður tikin úr roknskapinum, er talan um eini fult lóglig boð frá einum fult lógligum, yvirskipaðum myndugleika.

Og eini slík boð frá einum eftirlitsmyndugleika, hevur eitt býráð skyldu til at geva seg undir.

Hann heldur eisini, at ein kommuna eigur at ganga undan at halda landsins lógir.

Men tað skal vera við teirri viðmerking, at hildið verður fast um kravið um at Smyril skal gjalda havnargjald.

Men eydnast tað ikki at finna semju, eigur býráðið at umhugsa at royna málið í rættinum, tí tað heldur hann, at Smyril eigur at gera.

Hann vísir eisini á, at í tvey undanfarin ár hevur landsstýrið góðkent roknskapin, soleiðis, sum hann er nú, men nú hevur landsstýrið so brádliga skift støðu.

# Mangla blóðgevarar í Føroyum

**Í kvøld, týskvøldið, hevur felagið Blóðgevi aðalfund í Miðlahúsinum í Havn og tey siga, at hóast tað gongur fram á, eru tað enn ov fáir føroyingar, sum eru blóðgevarar**

BLÓÐGEVING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verða alsamt fleiri og fleiri blóðgevarar í Føroyum. Men enn eru tað ov fá fólk, sum hava meldað seg til at verða blóðgevarar.

Tað má felagið Blóðgevi ásanna, nú tey hava aðalfund í Miðlahúsinum klokkan 19.30 í kvøld, týskvøldið.

Marita Simonsen, forkvinna í felagnum, sigur, tey hava alsamt brúk fyri blóðgevarum, bæði tí, at tað sum heild eru ov fáir og tí at tað eru so nógvir, sum gevast av náttúrligum ávum.

- Fólk, sum hava høgt blóðtrýst, sukursjúku, høgt kolestorol og aðrar sjúkur, kunnu ikki geva blóð og tað ger, at yvir 100 blóðgevarar mugu gevast hvørt ár.

Í løtuni eru næstan 1400 limir í felagnum.

Hon sigur, at tað er ein vanlig misskiljing, at tað bara er brúk fyri blóði í sambandi við vanlukkur og skurðviðgerðir.

- Tað er í veruleikanum tann minni parturin, tí meginparturin av teimum, sum fáa blóð, fáa tað í sambandi við ymsar sjúkur.

Annars hevur felagið eina heimasíðu á internetinum, har tað ber til at melda seg sum blóðgevara. Hon eitur www.gevidblod.fo